Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Jóhannis Joensen, løgtingsmaður

Svarari: Árni Skaale, landsstýrismaður í fiskivinnumálum

Evni: Veðurstova Føroya

Spurningar:

1. Nær verður Veðurstova Føroya staðsett á flogvøllinum í Vágum?
2. Er ætlanin at skipa veðurstovuna í tríggjar eindir?
3. Er ætlanin, at eindirnar skulu skipast á flogvøllinum í Vágum, í Tórshavn og í Klaksvík?

Viðmerkingar:
Nógv gleðast saman við mær um, at vit endiliga hava kjølfest eina føroyska veðurstovu í Føroyum. Fjølmiðlarnir hava eisini tikið hetta upp í fleiri tíðindasendingum.

Veðurstova Føroya hevur lýst eftir starvsfólki, sum nú eru farin til verka. Hesa fyrstu tíðina, meðan veðurstovan verður skipað, hevur fyrrverandi landsstýrismaður Jacob Vestergaard kjølfest føroysku veðurstovuna við leiðsluábyrgd undir Vørn. Síðani var ætlanin at staðseta veðurstovuna endaliga á flogvøllinum í Vágum.

Ábendingar eru um, at ætlanin er at skipa Veðurstovu Føroya í tríggjar eindir. Tó er ikki greitt, hvat liggur í hesum, og hvar hvør eind verður.

Veðurkort hava verið gjørd á flogvøllinum í Vágum í samráð við DMI í áratíggju, og veðurfrøðingar hava arbeitt á flogvøllinum við nýggjastu staðbundnu veðurforsøgnunum hesa tíðina.

Í framtíðini verður hetta eisini neyðugt, og tað hevur týdning at kjølfesta staðbundna veðurfrøði á flogvøllinum, serliga tá hugsað verður um framtíðar útbyggingar av flogvøllinum og økta virksemið innan flogvinnu í framtíðini.

Fyribilsloysnin undir Vørn verður søgd at vera avmarkað. Tó hava fyribilsloysnir javnan tað at draga út ella gerast til endaligar loysnir. Fyri at fáa eina frágreiðing um ætlanirnar, verður hesin fyrispurningur settur landsstýrismanninum.

Á Løgtingi, 12. januar 2022

Jóhannis Joensen